SKEIÐSTOVAN KVASIR FARODANE

## Brot úr skeiðskrá okkara:

| | |
|---|---|
| 24/08 | Grundskeið í tekstviðgerð v/MS Word<br>4 x kl. 13:30 - 16:30: 24/08 + 31/08 + 07/09 + 14/09 |
| 25/08 | Myndaviðgerð við Adobe Photoshop I<br>2 x kl. 08:30 - 15:30: 25/08 + 01/09 |
| 29/08 | Design við Adobe Illustrator<br>2 x 08:30 - 15:00: 29/08 + 30/08 |
| 29/08 | Acrobat 6 - PDF-fílar og elektroniskar publikatiónir<br>2 x kl. 16:00 - 21:30: 28/08 + 29/08 |
| 29/08 | Grundskeið í datagrunnum v/MS Access<br>4 x kl. 13:30-16:30: 29/08 + 05/09 + 12/09 + 19/09 |
| 29/08 | Acrobat - PDF og elektroniskar publikatiónir<br>1 x kl. 16:00 - 21:30: 29/08 |
| 30/08 | Lær Myndaviðgerð - digitalfoto og skanning<br>3 x kl. 09:00 - 12:00: 30/08 - 06/09 - 13/09 |
| 31/08 | Lær at nýta teldu<br>3 x kl. 09:00 - 12:00: 31/08 + 07/09 + 14/09 |
| 15/09 -nýtt | Skeið í Telefon -móttøku - tænastu og CallCenter<br>2 x kl. 09:00 - 16:00: 15/09 + 20/09 |
| 16/09 | Lær at nýta internet<br>3 x kl. 09:00 - 12:00: 16/09 + 23/09 + 30/10 |
| 21/09 | Lær Heimasíðusmíð<br>3 x kl. 09:00 - 12:00: 21/09 + 28/09 + 05/10 |



PROJEKTSTÝRING:

| | |
|---|---|
| 22/09 | Projektstýring við MS Project<br>2 x kl. 08:30-15:30: 22/09 + 23/09 |
| 22/09 | Víðkað projektstýring við MS Project<br>2 x kl. 17:00-21:00: 22/09 + 23/09 |

ÚTBÚGVINGAR TIL LEIÐARAN:

Í heyst fer KVASIR nú eisini í samstarv við NOEA í Danmark at bjóða fram nakrar útbúgvingar, ið venda sær til leiðarar av ymiskum slag.

| | |
|---|---|
| 26/09 - nýtt | Búskapur og fíggjarstýring fyri leiðarar<br>6 x kl. 08:30 - 15:00: 26/09 + 27/09 + 24/10 + 25/10 + 14/11 + 15/11 |
| 26/09 - nýtt | Leiðsla í egnari fyritøku<br>10 x kl. 15:30 - 22:00: 26/09 + 27/09 + 24/10 + 25/10 + 14/11 + 15/11 + 12/12 + 13/12 + 23/01 + 24/01 |



AutoCad:

| | |
|---|---|
| 27/09 - nýtt | AutoCad: AutoCAD Basis - grundskeið<br>4 x kl. 09:00-16:00: 27/09 + 28/09 + 29/09 + 30/09 |
| 27/09 - nýtt | AutoCAD dagføring - tað nýggjasta í AutoCad<br>3 x kl. 17:00 - 21:00: 27/09 + 29/09 + 30/09 |

TELDUKOYRIKORT "BASIS" - nú bert 4 skeið byrja 24/08 ella 17/10

Sum nakað nýtt fara vit nú eisini at bjóða Teldukoyrikort BASIS. Hetta er eitt prógv, ið næmingurin kann fáa, eftir at hava staðið royndirnar, ið hoyra til 4 av skeiðunum, ið eru í tí vanliga teldukoyrikortinum. Hesi skeið eru: Teldan & Fíluskipanin - Teksviðgerð við MS Word - Rokniark við MS Excel og Samskiftisnet við IE og Outlook Express (internet v.m.)

Tel 320 204
www.kvasir.fo

# Lena gevur nýggja stakfløgu út



»Step on the gas«, er nýggja stakfløgan hjá Lenu. »Step on the gas« verður send til danskar útvarpsstøðir í hesi vikuni. Lagið er tikið av komandi fløguni »Can't erase it«, sum er ein tillagað útgáva av fløguni við sama heiti, sum Lena gav út í Føroyum í fjør.

Fyrsta stakfløgan av útgávuni var »I still love you«, og hetta lagið hevur verið at hoyrt á donskum útvarpsstøðum seinastu mánaðirnar, nú verður so roynt við enn einum lagi. Í hesum sambandi spælir Lena eina konsert í væl umtókta spælistaðnum Lades Kælder mitt í danska høvuðsstaðnum.

Nýggja útgávan av »Can't Erase it« er bygd á føroysku útgávuna, Óli Poulsen hevur saman við Lenu og Niklas arbeitt tríggjar vikur í summar við at gera fløguna klára. Umframt onkrar broytingar er okkurt nýtt lag á henni.

Men Lena spælir eisini á aðrar streingir enn tann danska marknaðin, hon hevur júst gjørt sáttmála við amerikanska útgávufelagið Private Wavs um at tey sleppa at brúka løgini »Can't erase it« og »Step on the gas« í sjónvarpssendingum og filmum.

**nud**

# Danmark fær ikki fingurin frá 200

Tá 200 fara á pallin í Vega í Keypmannahavn leygarkvøldið 27. august til Atlantic Music Event, verður tað uttan papmasjefukkjúfingurin. Bólkurin fær ikki tríggjar metur høga skrímslið við í flogfarið, og tað er trupult og dýrt at frakta hann niður.

Pappmasjefokkjúfingurin var partur av pallmyndini hjá 200 á G! Festivalinum, og varð somuleiðis mettur at hava so stórt listarligt virði at hann gjørdist eitt av listaverkunum á ólavsøkuframsýningini í Listaskálanum.

Men alt hetta sleppa danir og føroyskir útisetar ikki at uppliva, men noyðast at taka til takkar við heimsins største tónlistarliga fokkjúfingri tá 200 punka Keypmannahavn í sand og øsku.

# Eminem hevur avlýst konsertferðina

Amerikanski rapparin Eminem, sum 2. september skuldi spæla konsert í Keypmannahavn, hevur avlýst hesa og allar hinar konsertirnar á Evroparundferð síni. Konsertferðin »Anger Management Tour«, har Eminem og 50 Cent skuldu spæla fyri rapptystum evropeum, er sambært Ekstra Bladet, endaliga avlýst og ikki útsett.

Eminem er ótrúliga vælumtóktur í Føroyum, og hevur verið fastur fúsur á 15 teimum bestu, hvørja ferð hann hevur givið eina stakfløgu út. Tí eru tað ivaleyst nógvir føroyingar, ið skuldu havt verið á konsertini í Parken.

Plátufelagið hjá Eminem sigur, at orsøkin til avlýsingina er trupulleikar við heilsuni.

**nud**

# Motorsúkklur hittast í Sandoynni

**Leygardagin 3. september verður innrás av motorsúkklum í Sandoynni, tí tá skipa Føroya Ellisakfør, saman við ungmannafelagnum Samljóð í Skopun, fyri MC-Boogie í Sandoynni**

MOTORSÚKKLUR



*3. september verður rættuliga innrás av motorsúkklum á Sandoynni, tá Føroya Ellisakfør skipa fyri MC-boogie saman við Samljóð í Skopun. Myndin er frá motorsúkklutúri í Vágum í fjør*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

MC-Boogie kallast tað, tá motorsúkkluáhugað hittast til sosiala samveru og felagskoyring á motorsúkklum, og síðani halda veitslu um kvøldið. Hetta tiltakið hevur verið afturvendandi síðani 1999. Føroya Ellisakfør siga í tíðindaskrivi, at tiltakið er fyri øll mc-áhugað, uttan mun til, um tú ert limur í nøkrum felagskaði ella ikki.

Tiltakið var fyrstu ferð skipað í 1999 í sambandi við, at Føroya Ellisakfør hevði vitjan av útlendskum mc-gestum.

Síðan er hetta vorðið eitt afturvendandi tiltak.

Eftir at felagið Føroya MC varð stovnað, hava verið tvey tiltøk um árið, har Føroya MC stendur fyri øðrum og Føroya Ellisakfør fyri hinum tiltakinum. Sambært siðvenjuni er fyrra MC-Boogie fyrsta vikuskiftið í mai og seinna 1. vikuskiftið í september.

Møtt verður á middegi við felagshølið hjá Føroya Ellisakførum yviri við Strond í Havn.

Hagani verður koyrt til ferjuleguna á Gomlurætt.

Tá ið komið er til Skopunar, verður koyrt runt í oynni restina av seinnapartinum.

Um kvøldið verður skipað fyri veitslu í Skopun.

Meiri fæst at vita um tiltakið á heimasíðuni hjá Føroya Ellisakførum (www.ellisakfar.com).